# Trygt at skráseta sjálvuppgávuna um internetið

*Um nakar heldur, at trygdarváttanin á síðuni, har ein skrásetur sjálvuppgávuna er farin úr gildi, so er tað ikki rætt. Hon er endurnýggjað, men slóðin á skrásetingarsíðuni er ikki røtt. Síðan er eins trygg og allar aðrar, sigur edv-deildin hjá Toll- og Skattstovu Føroya*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fríggjadagin kom okkum fyri oyra, at trygdarváttanin fyri heimasíðuna, sum Toll- og Skattstovan biður okkum brúka til at skráseta okkara sjálvuppgávu, er farin úr gildi.

Verisign útskrivar eina váttan, sum liggur á eini síðu fyri seg, og velir ein at hyggja frá síðuni, har sjálvuppgávan skal skrásetast, so sigur hon, at trygdartíðin er farin.




Men tað er bara ikki rætt.

Kurt Madsen sigur, at hann sjálvur hevur fingið endurnýggjað trygdarváttanina frá VeriSign, men at slóðin á skrásetingarsíðuni er skeiv.

– Tað er eitt mistak, sum verður rættað beinanvegin. Vit hava fingið nýggja váttan, sum er galdandi fyri hetta árið, og hon sæst á eini aðrari síðu. Far inn á forsíðuna á okkara internet staði og vel tann knøttin, sum eitur »Um síðuna«. Har er ein slóð til røttu trygdarváttanina, sigur Kurt Madsen.

## Sum við Visakortum

Sambært Kurt Madsen er tí eingin vandi við at skráseta sjálvuppgávuna á internetinum.

– Síðan er trygg. Vit brúka somu skipan, sum verður brúkt í sambandi við interhandil við VISA korti og tað er tann skipanin, sum er mest brúkt, sigur Kurt Madsen.

Hetta verður eisini váttað av einum, sum er kunnugur við internetið, sum Sosialurin hevur tosað við.

Hann sigur, at tað í Føroyum er sera lítil møguleiki fyri at útvega sær atgongd til slíkar upplýsingar, tí síðan liggur í Føroyum og tann sum letur seg skráseta skal bert gjøgnum tað eina liðið.

– Tann ella teir, sum vilja bróta inn eftir upplýsingum, skulu bróta inn á servarin hjá Føroya Tele og tað er sera torført, sigur hann.




*Hetta er tann rætta myndin. VeriSign hevur endurnýggjað trygdarváttanina til Toll og Skattstovu Føroya, men slóðin er ikki broytt á tí síðuni, har tú skrásetur tína sjálvuppgávu. – Tað er eitt mistak, sum verður rættað beinanvegin, sigur Kurt Madsen, leiðari á edv-deildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya*

– Tað var øðrvísi um síðan lá í Avstralia, tí so vóru so nógv støð, sum upplýsingarnar skuldu ígjøgnum og tá er altíð truplari at tryggja, at alt fer rætt fram.

Hann leggur afturat at SSL skipanin, sum Toll- og Skattstovan brúkar er tann mest vanliga skipanin, sum er brúkt í sambandi við internethandil og líknandi.

– Tað eru tvær skipanir at velja ímillum, ein sum eitur SET og so hendan, sum eitur SSL. Tann fyrra er ikki so løtt at arbeiða við, men tað er SSL-skipanin. Tí velja tær flestu fyritøkurnar at arbeiða við henni, sigur serfrøðingurin.

Tí kunnu vit staðfesta, at skrásetingarsíðan hjá Toll- og Skattstovuni er eins trygg og allar aðrar og at veitarin hevur endurnýggjað trygdarváttanina, sum sigur at Toll- og Skatt er tað teir siga seg vera.

# Trupulleikin varð ongantíð loystur

*Sjey fólk á Innheintingardeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya hava sagt seg úr starvi og við tí er trætan á deildini aftur í fullum blóma*

SEINUR TRÓNDARSON

Trætan á Innheitingardeildini hjá Toll- og Skattstovu Føroya stendur aftur í fullum blóma.

Fyri stuttum søgdu sjey av starvsfólkunum seg úr starvi og orsøkin til tað var, at umstøðurnar vóru ikki vornar petti øðrvísi, enn tær vóru áðrenn arbeiðssteðgin, og at tey ikki høvdu meira at gera á stovninum.

Í frágreiðing, sum Starvsmannafelagið hevur sent fíggjarmálaráðharranum verður víst á, at umstøðurnar sum vóru áðrenn arbeiðssteðgin eru versnaðar síðani semjuna og at tey sjey starvsfólkini tí ikki hava sæð annan útveg enn at siga seg úr starvi.

Eisini vísir felagið á, at hóast Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið gjørdu nágreiniliga semju um ymiskt, so hevur leiðslan á stovninum ikki fylgt semjuni.

*Men er trupulleikin ikki, at tann veruliga arbeiðsósemjan ongantíð varð loyst?*

– Tað sær tíverri soleiðis út, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Arbeiðsósemjan endaði sum ein knútur um hvør hevði rætt til hvat heldur enn at loysa samstarvstrupulleikarnar á deildini og tað kann verða ein orsøk til, at ósemjan nú blómar aftur.

Ein annar trupulleiki við semjuni var, at tað ikki var leiðslan á stovninum sum gjørdi hana, men sjálvt fíggjarmálastýrið, heldur Gunnleivur.

– Tað hevur síðani víst seg, at leiðslan ikki hevur fylgt semjuni og tískil ikki hevur gjørt eftir boðum frá sínari leiðslu, sigur Gunnleivur.

Ein av trupulleikunum á deildini var, at leiðslan kundi arbeiða saman við nøkrum og ikki við øðrum. Hetta sást aftur í dagliga arbeiðinum og gjørdi viðurskiftini sera torfør at arbeiða undir.

– Og nú tey hava sagt upp, hava nøkur teirra fingið boð um at vera heima, meðan onnur sleppa til arbeiðis í uppsagnartíðini. Tey vera viðgjørd, sum lógbrótarar, sigur Gunnleivur, sum heldur at slíkt als ikki eigur at koma fyri.

At enda staðfestir Starvsmannafelagið at semjan, sum varð gjørd 4. januar í ár er brotin. Tey sjey fakliga sterkastu fólkini eru farin úr starvi og deildin liggur í skeljasori, stendur at lesa í brævinum.

Tí heldur felagið, at fíggjarmálaráðharrin eigur at viðganga, at alt er ikki farið rætt fram á deildini.

# Stjórin farin frá

*Formaðurin í Ferðaráðnum visti av ongum, at seinasti arbeiðsdagur hjá fráfarandi stjóranum var í gjár. Vinnumálastýrið hevur fingið boðini, sigur Annika Wardum Joensen*

SVEINUR TRÓNDARSON

Í gjár var seinasti arbeiðsdagur hjá fráfarandi stjóranum í Ferðaráðnum.

Annika Wardum Joensen, sum annars boðaði Vinnumálastýrinum frá, at hon skuldi vera í starvi til 1. apríl hevur nú gjørt av, at hon fer úr starvinum nú.

– Eg fari at taka mær av løttum til 1. apríl, tá eg byrji í nýggjum starvi, sigur Annika.

Hon vil tó ikki upplýsa hvat hon fer at takast við.

Petur Olivur í Hoyvík, formaður í Ferðaráðnum, sigur at hann visti av ongum at stjórin gevst nú, men Ferðaráðið hevur ein varastjóra, sum fer at hava leiðsluna til 1. apríl, tá nýggjur stjóri eftir ætlan skal taka við.

# Tríggir persónar innstillaðir

*Ferðaráðið hevur innstillað tríggjar persónar til nýggja stjórastarvið og Finnbogi Arge sigur, at starvið verður sett í næstu viku*



SVEINUR TRÓNDARSON

Í næstu viku verður nýggjur stjóri settur fyri Ferðaráð Føroya.

Nevndin er liðug við sítt arbeiði og hevur latið landsstýrismanninum við vinnumálum, Finnboga Arge, innstillingina.

Sosialurin hevur frætt, at tað eru innstillaðir tríggir persónar til starvið sum nýggjur ferðastjóri - tvey mannfólk og ein kvinna.

Hvør tað er og í hvørjari raðfylgju tey eru innstillað hevur ikki eydnast okkum at fáa uppspurt.

Finnbogi Arge, landsstýrismaður, sigur í stuttari viðmerking, at hann fer at hyggja at innstillingini ein av allarfyrstu døgunum og hann roknar við, at nýggi stjórin verður settur fyrst í næstu viku.

Hetta samsvarar væl við ætlanirnar hjá Ferðaráðnum um at nýggi stjórin skal taka við 1. apríl. Kemur nýggi stjórin úr øðrum starvi, skal hann hava tíð at loysa seg haðani og tað tekur sum oftast ein mánað at loysa seg úr einum starvi.





*Um 1.000 rúmmetrar av gróti skulu spreingjast úr berginum um dagin vestan fyri Timburhandlin hjá Balslev*
Mynd: Álvur Haraldsen

# Balslev byggir út í stórum stíli

*Javna trýstið á byggimarknaðin ger tað neyðugt hjá timburhandlinum, Balslev, í Havn at planera stórt øki vestan fyri timburdeildina*

JOHN JOHANNESSEN

Vinnulívið, land og kommunur byggja út í stórum. Hetta merkist væl hjá timburhandlunum kring landið. Og so væl merkist tað hjá Balslev í Havn, at timburhandilin nú er farin at byggja út og tað í stórum.

Balslev er í ferð við at spreingja niðan í bergið vestan fyri timburdeildina, har stórt øki skal planerast. Økið kal nýtast til vørumóttøku, og í um eitt ella tvey ár, skal ein stór vørumóttøkuhøll byggjast á økinum.

## Greiða fløkjuna

Adam Madsen frá Balslev sigur, at tað fer at lætta munandi um arbeiðið, tá stóra økið til vørumóttøku verður liðugt.

– Støðan í dag er tann reini ruðuleiki, hvørja ferð vit fáa tilfar. Tí tilfarið kemur nevniliga inn sama veg, sum tað fer út, og ger hetta, at bingjur og annað stendur í vegin fyri viðskiftafólkunum.

Adam Madsen vísir á, at tankin við vørumóttøkuøkinum er, at tilfarið skal koma inn í øðrum endanum av húsinnum og verða selt út aftur gjøgnum hin endan. Hetta skapar greiðari yvirlit yvir arbeiði, somuleiðis sum arbeiðið eisini fer at ganga betur.

## Liðugt í summar

Vørumóttøkuøkið hjá Balslev skal vera liðugt í summar. Spreingjast skulu um 1.000 kubikkmetar av góti úr berginum um dagin. Tá komið er niður á sama støði, sum timburdeildin í dag er á, skal økið planerast, og so er klárt at taka tað í nýtslu.

Arbeiðinum stendur P/F Byggitek fyri.

Frá Balslev siga tey, at tá økið er liðugt, er møguleiki fyri at víðka um timburhøllina, somuleiðis sum hetta eisini gevur pláss fyri einari høll til at taka ímóti tilfari í. Høllin verður helst liðug um ár 2002.

## Jøvn gongd

Adam Madsen sigur, at tey á Balslev hava merkt eina javna gongd í byggingini av húsum seinastu árini, og sýnist hendan gongdin javnt at halda fram.

Men harafturímóti eru vinnan og tað almenna farin at gera størri útbyggingar, og er tað hetta, ið merkist serliga væl hjá timburhandlunum fyri tíðina.

Tilfarið til virkisbygningar og almennar bygningar er sum oftast nógv størri tilfar, enn til vanliga sethúsabygging, og krevur størri pláss hjá timburhandlunum.

Balslev fer í næstum at gera eina kanning av býtinum millum vanliga sethúsabygging, vinnulívsbygging og almenna bygging.

# Álitini útsett eina viku

*Uttanlandsnevndin hevði eingi álit til fullveldismálið at bera landsstýrinum eftir fundin í gjár. Men um eina viku eru tey helst klár*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrið fekk einki álit frá uttanlandsnevndini um fullveldismálið í gjár. Nevndin hevði fund klokkan níggju gjáramorgunin, og tá skuldu nevndarumboðini fyri ymisku flokkarnar leggja kladdur sínar til álit fram. Tískil kundi eisini væntast, at landsstýrið fór at fáa álitini í gjár.

Tað bar kortini ikki til at koma so mikið langt áðrenn tingfundin klokkan ellivu, og gjørdi formaðurin í uttanlandsnevndini gjørt av at lata limirnar fáa eina viku afturat at arbeiða við at gera álit. Næsti fundur verður tískil komandi fríggjamorgun.

Áðrenn fundin í gjár ljóðaði, at samgongan í tí stóra var samd um høvuðslinjurnar til eitt álit, sum Miðflokkurin eftir øllum at døma eisini kundi taka undir við.

Somuleiðis fréttist, at Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin arbeiddu saman um eitt annað álit, ið teir høvdu vónir um, at Miðflokkurin eisini fór at taka undir við.

Tað eydnaðist kortini ikki Sambandsflokkinum at orða eitt felgs álit áðrenn fundin. Men flokkarnir hava ikki mist vónina. Teir ætla sær at nýta komandi viku til at arbeiða konstruktivt við at finna røttu orðingarnar til eitt álit, ið báðir flokkarnir kunnu standa aftanfyri.

Sostætt kann væntast, at landsstýrið fríggjadagin fær handað tvey álit í fullveldismálinum. Tað fær helst eitt frá samgonguflokkunum og Miðflokkinum og eitt frá Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum.

# Uttanlandsnevndin skal ráðgeva

Í viðtalu í blaðnum í gjár endurgóvu vit Høgna Hoydal fyri at siga, at uttanlandsnevndin sleppur at flyta hvørt komma í samráðingarupplegginum um ríkisrættarligu støðuna, um hon vil.

Hetta var ein heldur óheppin orðing. Tað, Høgni Hoydal í veruleikanum segði var, at uttanlandsnevndin sleppur at ráðgeva til hvørt komma í samráðingarupplegginum. Men talan er sjálvsagt bert um ráðgeving.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY
2,2 XL
Skrás.: 21-12-91
Km.: 80.000
Prísur: 98.600,- Garanti*
Sýnaður 10-98

TOYOTA YARIS 1.0
SOL H/B
Skrás.: 10-08-99
Km.: 8.500
Prísur: 122.600,- Garanti**
Sýnaður 08-99

TOYOTA CARINA
1,6 GL
Skrás.: 01-11-89
Km.: 154.000
Prísur: 49.600,-
Sýnaður 10-98

TOYOTA HIACHE
10 PERS BUSSUR
Skrás.: 16-06-95
Km.: 160.000
Prísur: 138.600,- Garanti*
Sýnaður 10-99

TOYOTA COROLLA
1,3 Xli STATION
Skrás.: 19-10-95
Km.: 28.000
Prísur: 94.600,- Garanti*
Sýnaður 10-95

FORD MONDEO
1,8
Skrás.: 07-05-97
Km.: 12.000
Prísur: 149.600,- Garanti*
Sýnaður 05-97

TOYOTA COROLLA
1,3 SEDAN
Skrás.: 12-02-96
Km.: 16.000
Prísur: 97.600,- Garanti*
Sýnaður 02-96

FORD FIESTA
1,3
Skrás.: 29-04-96
Km.: 104.000
Prísur: 66.600,-
Sýnaður 04-96

TOYOTA COROLLA
1,6 XLi H/B
Skrás.: 31-10-96
Km.: 35.000
Prísur: 108.600,- Garanti*
Sýnaður 10-96

NISSAN SUNNY
1,4 LX SEDAN
Skrás.: 01-11-91
Km.: 146.000
Prísur: 49.600,-
Sýnaður 04-99

TOYOTA COROLLA
1,3 Xli H/B
Skrás.: 10-05-90
Km.: 105.000
Prísur: 52.600,-
Sýnaður 02-00

NISSAN MAXIMA
3,0 AUT. GEAR
Skrás.: 15-12-87
Km.: 135.000
Prísur: 69.600,-
Sýnaður 12-99

VØRUVOGNAR

MITSUBISHI PAJERO VAN
Skrás.: 05.10.95
Km.: 85.000
Prísur: 138.600,-
Sýnaður 06-99

AVHEINTINGARTILBOÐ

MITSUBISHI GALANT
DIESEL
Skrás.: 25-08-89
Km.: 287.000
Prísur: 19.000,-
Skal sýnast!

OPEL
KADETT
Skrás.: 01-06-86
Km.: 97.000
Prísur: 10.000,-
Sýnaður 06-99

HONDA
CIVIC 1,5
Skrás.: 01-06-86
Km.: 175.000
Prísur: 15.000,-
Sýnaðpur 12-98

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

Støkkið inn á gólvið!

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - Tel. 311820